## DAGSINS MEINING

### Stórhending - eiga tó at endurskoða íløgurnar

Tvær stórar hendingar fóru fram á samferðsluøkinum hósdagin. Onnur fer at hava stóran týdning fyri trivnaðin, vinnuna, fólkið, búsetingina og mentanina í einum heildum landsluti. Hin fer afturímóti at hava avgerandi ávirkan á eina bygd - um hon aftur fer at mennast og verður tann væla bygd, hon einaferð var.

Hugsað verður um, at hósdagin varð fyrsta skotið latið av í Norðsjóvartunnlinum, samstundis sum at tað nú er koyrandi til bøgarðarnar í Gásadali. Seinra hendingin er søgulig, tí nú hava allar bygdirnar í Føroyum fingið vegasamband. Vit kunnu tí siga, at tann samferðsluútbygging, sum skjøtul varð settur á í 1920-unum, nú er rokkin.

Men leggjast skal afturat, at vit koma ongatíð á mál, tá tað snýr seg um samferðslu. Eitt vælrikið og virkið samfelag krevur eitt gott undirstøðukervi, og krøv fara alla tíðina at verða sett til nýggjar farleiðir. Tað veri seg tunnlar, skip, ferjulegur, havnaløg og nýggjar vegir.

Sum gongdin hevur verið tey síðstu árini, tá skipafeløgini góvust at sigla til størru plássini, serliga fiskivinnuplássini, er trýstið á ferjurnar og vegirnar økt munandi. Hetta hevur darvað ferðsluni, serliga útflutningsvinnuni, og hevur kostað nógv í bíðipeningi í Lorvík og Klaksvík og til fyri einum ári síðani í Vestmanna og á Oyragjógv.

Nú Vágatunnilin hevði verið opin í eitt ár, gjørdu fjølmiðlar støðuna upp. Tað tóktist sum øll vóru á einum máli um, at tunnilin hevði verið gagnligur fyri vinnu, handilslív, bygdirnar og ikki minst sjálva ferðsluna, tí nú koyra akførini nógv hóvligari. Fólk skulu ikki traðka á spidaran fyri at koma so frammaliga sum møguligt í bíðiraðið. Hetta merkir, at tunnlin eisini bøtir ferðslutrygdina. Lítið er at ivast í, at tá norðingar í 2007 gera støðuna upp á ársdegnum fyri at Norðoyatunnilin, fara teir at koma við somu skoðsmálum.

Nú er spurningurin, um vit ikki skulu endurskoða langtíðarætlanina fyri samferðslukervið og spyrja: - hvat hevur mesta týdningin fyri føroyska búskapin? Vit vita, at ynski um onkran tunnil trokar á. T.d. Hovstunnilin. Og hann skal sjálvandi eisini gerast og aðrur skulu kanska gerast av nýggjum.

Hinvegin vita vit, at stórar broytingar henda í marknaðarstøðuni hjá útflutningsvinnu okkara. Í nógvum førum snýr tað seg um at koma skjótt á marknaðir við feskum fiskavørum. Treytin fyri tí eru flutningsflogfør, sum krevja ein størri flogvøll enn floghavnin í Vágum hevur. Tí mugu vit hugsa okkum væl um, hvussu vit raðfesta íløgurnar komandi árini, tí raðfestingin má slóða fyri væl størri samfelagsinntøku, um vit skulu byggja upp ein sjálvberandi búskap.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú skal arbeiðast!



**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*

Óivað eru nógvar orsøkir til, at føroyska veljarafjøldin kemur til sína greiðu niðurstøðu í veljarakanningini fyrr í vikuni, sum fyrst og fremst vísti Sambandsflokkinum ovurstórt álit.

Lítið man vera at ivast í, at vantandi stevið í fráfarnu landsstýrissamgonguni hevur átt sín stóra part av æruni fyri, at álitið á so-kallaðu fullveldiskósina er fokið.

Men ikki skal heldur undirmetast, at andstøðan á tingi hesi fimm farnu árini dúgliga hevur roynt at víst á gongdar leiðir, har samgongan kortini valdi at dúva upp á sínar skýklappar og halda sína egnu leið.

Tíbetur steðgaði ørskapurin nú, so ein møguleiki framvegis er fyri at fáa Føroyar aftur á beint, so tað aftur kann verða liviligt hjá øllum her á landi.

Kortini er greitt, at til tað krevst ein stórur arbeiðsinnsatsur, tí tað er ikki smávegis uppgáva, ið bíðar eftir einari komandi landsstýrissamgongu, eftir at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin í tveimum landsstýrum hava togað í ymsar ættir - við fullkomnum vanstýri sum størsta prísinum.

Nú skal arbeiðast og tað ongantíð ov skjótt. Sambandsflokkurin er til dystin fús og vil fegin taka við tí áliti, veljarin sær út til at vísa, nú bara ein mánaður er til valið.

Vit byggja ikki okkara politikk á ynskidreymar og hvørvisjónir, men á veruligan politikk, ið skal verða landi og fólki at gagni. Minst til tað, tá krossurin skal setast 20. januar!

# Lad Naser Khader leve



**Peter O.K. Olofson**
*Klaksvik*

Vi vil kæmpe for Naser Khaders ret til at leve, også selvom Naser Khader har indledt en kampagne for, at endnu flere færøske børn skal have mulighed for at dø i moderliv. Men ikke blot Naser Khaders ret til at leve - også ethvert andet menneskes ret.

Når Khader i Utvarp Føroyar d. 18/12 gør en dansk læge til talsmand for det færøske Pro Vita og er fortørnet over, at hun spørger om "den radikale politiker (Khader) er på vej med en invasion af de alt for kristne øer", så er hertil at bemærke to ting.

1) Den danske læge er mere end velkommen til at blive medlem at det færøske Pro Vita og blive talskvinde for det færøske Pro Vita, men at Khader ikke formår at skelne mellem det færøske Pro Vita og andre organisationer, må ligge ham til last.

2) Når Khader ved at citere den danske læges ord vil gøre det til en religionskrig, har han ganske enkelt ikke læst godt nok på lektien. Alle vegne, hvor den kristne tro vandt fodfæste, var et af kendetegnene netop, at den kristne etik, herunder budet om ikke at slå ihjel, blev norm for samfundet. Netop derfor var en af følgerne, at man holdt op med at slå børn ihjel – ufødte såvel som fødte. Det er den etik, Khader gør op med, og det helt uafhængig af, om han selv er muslim, profan humanist eller noget helt tredje. At Khader selv som muslim er i konflikt med hovedparten af verdens muslimer er en anden side af sagen. Det ved han godt selv. De muslimske lande har nemlig for vane at forbyde fosterdrab.

Khader lagde ud med i Politiken at kalde det færøske Pro Vita en rabiat (fanatisk) terror-organisation. Før var det terror, når man ville slå ihjel, nu var det lige pludselig terror, når man vil værne om livet. Siden har Khader modificeret dette i en pressemeddelelse fra det radikale venstres pressetjeneste (16/12). Begrundelse: Pro Vita er ikke en gren af den amerikanske Pro Life organisation. Igen havde Khader ikke læst godt nok på lektien. Der findes hundredevis af amerikanske Pro Life bevægelser, men ikke en samlet organisation, og stort set alle tager afstand fra at anvende vold i deres arbejde. Så nu var det færøske Pro Vita ikke længere en rabiat terror-organisation, men blot rabiat, ifølge det som Khader sagde i Utvarp Føroyar. Det er dog forunderligt, som Khader formår at gøre surt til sødt og sødt til surt. Pro Vita tager afstand fra at anvende vold imod børn – også i moderliv, og det er ifølge Khader rabiat. Khader går ind for vold imod ufødte børn, og vil have mulighederne udvidet på Færøerne, og det er naturligvis ikke rabiat. Forstå det, hvem der kan. Børnene forstår det i hvert fald ikke.

PS: Det er ikke korrekt, som Heini Gaard skriver i Dimmalætting d. 18/12-2003, at Pro Vita ikke selv har kommenteret Khaders udtalelser. Det kunne Heini Gaard have fået at vide, hvis han f.eks. havde kontaktet mig. Så havde han kunnet få en spændende historie om (manglende) presseetik.

# Jólaskip á Sørvági

Í dag, leygardagin 20. desember, kemur jólaskipið á Sørvág kl. 17.00 við jólamonnum umborð.

Sørvágs Tónleikarafelag spælir jólaløg á bryggjuni. Síðan verður farið heim í skúlan, har jólatræ verður, børnini fáa jólapakkar og jólamenninir lesa søgur. Eisini verður kaffi til tey vaksnu.

Tiltakið er fyri alla oynna. Vága Ríðingafelag skipar fyri tiltakinum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Sjálvbjargnisframtíð ella heimastýrisfortíð ?



**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*

Abraham Lincoln segði einaferð, at ein politikari hevur ábyrgdina av skipinum, men ikki av aldubrotunum. Og so er.

Føroyska skútan hevur verið væl stýrd seinastu nógvu árini - samstundis sum langt hevur verið millum búskaparligu aldubrotini.

**Munandi framstig framd**
Yvirskot hevur verið á fíggjarlógunum á hvørjum ári, ið fullveldissamgongan hevur stjórnað landinum. Uttanlandsskuldin er munandi niðurgoldin. Ríkisstuðulin er skerdur við 366 mió. kr. - er í dag bert 615,5 mió. kr. Uppsparingin er økt munandi, og síðan partvíst nýtt til afturrindan av uttanlandsskuld. Langtíðar íløguætlanir eru lagdar fyri landið, og íløgukarmur fyri land og kommunur. Munandi skattalættar eru veittir. Vinnulívið hevur fingið betur og frælsari karmar eitt nú við lægri partafelagsskatti - úr 28% í 20%. Stórur partur av studningspolitikkinum til vinnulívið er strikaður, og nýggj uppskot til studningspolitikk eru steðgaði.

Samstundis eru vælferðarøkini stimbrað. Almanna, heilsu-, útbúgvingar- og mentamálaøkini eru øll munandi uppraðfest. Eitt nú við nýggjum landssjúkrahúsi, hægri pensjónum, fleiri ellis- og røktarheimsplássum, nýggjum skúlum, hægri lestrarstuðli, Tjóðpalli Føroya o.s.fr. Eisini samferðsluøkið er munandi uppraðfest. Nevnast kunnu undirsjóvartunnil vestur í Vágarnar og til Norðoyggjar umframt nýtt Suðuroyarskip fyri bert at nevna nøkur fá dømi.

**Skal menningin steðga ?**
Men hóast hetta, so vilja valevnir fyri eitt nú Sambandsflokkin vera við, at fullveldissamgongan bert hevur verið til skaða fyri føroyska samfelagið. Hetta er sjálvsagt als ikki rætt og eru átøkini, ið nevnd eru omanfyri, bert nøkur dømi um hetta ikki er so.

Sambandsflokkurin vísir ferð eftir ferð á, at hann ynskir at broyta ta kós, ið undanfarna samgongan hevði sett. Men ynskja føroyingar hetta? Er ikki ynskiligt at halda áfram við at menna føroyska vælferðarsamfelagið, at betra um karmarnar hjá vinnulívinum, at fremja ein tryggan búskap, at fremja greiðan skilnað millum alment og privat og harvið forða skaðandi studningspolitikki, og at halda áfram á sjálvbjargniskós ?

**Sambandsflokkurin fyri studningspolitikki**
Tvey valevni hjá Sambandsflokkinum - Magni Laksáfoss & Edmund Joensen - hava í bløðunum boðað frá, at Sambandsflokkurin skal fáa búskaparligt skil í Føroyum, tí tað megna sjálvbjargnisflokkarnir ikki. Hesum sjónarmiðnum standa hesi valevni tó rættuliga einsamøll við.

Staðfestast kann, at vórðu øll uppskot Sambandsfloksins á Løgtingi um øktar útreiðslur fylgd seinastu árini, vórðu almennu útreiðslurnar hundraðtals mió. kr. størri enn í dag. Og varð tikið undir við seinasta uppskoti Sambandsfloksins á Løgtingi um at lata rækjuflotanum um 47 mió. kr. í studningi yvir 2 ár, so vórðu dyrnar latnar upp til studningspolitikk, sum vit kenna so væl frá 80'unum. Hetta hevði føroyski búskapurin ikki verið tryggari og sterkari av - tvørturímóti.

**Skútan er riggað væl til sjálvbjargniskós**
Allur serkunnleiki innan føroyskan búskap hevur víst á, at hóast aldubrotini eru ógvuslig í pørtum av føroyska vinnulívinum í løtuni, so er føroyska skútan so mikið væl fyri í dag, at hon megnar at standa ímóti hesum aldubrotum uttan stórvegis trupulleikar. Ferðin verður tálmað av aldubrotunum, men kósin kann haldast um hetta verður ynskt og um rætt verður stýrt. Og tá aldubrotini aftur fara at leggja seg er møguleiki fyri at náa í egna havn - um føroyingar ynskja hetta. Hetta vísir, at tey, ið staðið hava við ábyrgdini av føroysku skútini seinastu árini, hava megnað at gjørt hana til reiðar til alskyns brotasjógvar - gjørt hana til reiðar at náa har føroyingar ynskja.

**Val millum sjálvbjargnisframtíð og heimastýrisfortíð**
Valið tann 20. januar verður enn eitt sera avgerandi val. "Heimastýrissamgongan" og "aftur á sambandsleið" eru ekkó og fyribrigdi frá fortíðini. Vónandi gerast hesi ikki partur av framtíð Føroya. Vónandi kann føroyska skútan halda áfram á sjálvbjargniskós og halda áfram at verða alsamt betur riggað til.

Avgerðina eiga føroyingar tann 20. januar 2004.

# Hvørjum grundarlag skal samfelagið byggjast á?



**Arni Abrahamsen**
*Valevni fyri Miðflokkin í Eysturoynni*

Okkara samfelag byggir á nøkur grundleggjandi virði. Hetta eru virði, ið vit mugu viðurkenna og verja, um vit framhaldandi ynskja at varðveita okkara samfelag, soleiðis sum vit kenna tað í dag.

Eitt tað týdningarmesta av hesum er familjan. At vera ein partur av eini tryggari familju, er tað besta grundarlagið fyri persónligari menning og fyri at kunna gerast ein góður borgari í samfelagnum. Samfelagið hevur við lógini um hjúnaband viðurkent týdningin av at hava støðugar familjur. Orsøkin til at hjúnabandið er viðurkent við lóg, og hevur nøkur serrættindi, er heilt einføld tann at samfelagið ynskir at vísa týdningin av at hava støðugar familjur, og viðurkenna, at hjúnalagið er ein hornasteinur í samfelagnum. Eins og ferðslulógin sigur okkum, hvussu samfelagið ynskir at tann einstaki ber seg at í ferðsluni, vísir lógin um hjúnabandið okkum, hvussu samfelagið ynskir at familjan skal skipa seg. Hóast eg við mínum nýggja bil havi sera góðan hug til at koyra meir enn 80 km/t, fái eg av hesi orsøk ikki samfelagið til at broya lógina. Júst somu treytir eiga at vera galdandi vegna hjúnarbandið.

Í hesi tíð eru kreftir í okkara samfelag, ið royna av øllum alvi at bróta niður hesa serligu viðurkenning, hjúnabandið hevur í samfelagnum. Tað kann gott tykjast sakleyst at loyva skrásettum parlag, men um man hugsar seg um, so sær man at við at taka hetta stigið, so flytir man nøkur mørk, og gevur ikki longur hjúnabandinum viðurkenning sum hornasteinur undir samfelagnum. Við tíðini kemur hetta at broyta tað grundarlagið, okkara samfelag er bygt á.

Miðflokkurin gongur heilt inn fyri tí persónliga frælsinum, og ein og hvør skal hava loyvi til at mynda sítt lív, soleiðis sum hann ella hon ynskja, so leingi hetta ikki stríðir móti galdandi lóg, og ikki skaðar onnur, men Miðflokkurin vil ikki ganga við til at ein tann týdningarmesti hornasteinurin undir okkara samfelag, sum hjúnabandið millum mann og kvinnu er, skal missa sín serrætt í samfelagnum, tí hetta vil í longdini vera sera skaðiligt fyri grundarlagið undir okkara samfelag, sum vit kenna tað í dag.

Ein sterkur Miðflokkur á Tingi er trygd fyri at grundarlagið undir okkara samfelag verður varðveitt.
Les meira á heimasíðu míni:
heima.olivant.fo/~arnia

# Ganga fram á við røttum ryggi



**Høgni Hoydal**

Fyrsta veljarakanningin upp undir løgtingsvalið gevur Tjóðveldisflokkinum afturgongd í mun til seinasta val.

Tí eigur hon at verða ein saltvatnsinnspræning til øll tjóðveldisfólk og øll tjóðveldishugað í valstríðnum. Veljarakanningin er ein greið ábending um, at tað fer at krevja eitt ódnartak at halda fast um sjálvbjargniskósina í føroyska samfelagnum. Veljarakanningin er eitt varskó til tey sjálvbjargnishugaðu um at halda saman.

**Onki alternativ til ein sterkan Tjóðveldisflokk**
Skulu vit fáa eitt gott valúrslit, so mugu allar kreftir savnast at stríðast fyri Tjóðveldisflokkin og tjóðveldishugsjónini. Tað er í mótburðinum at vit skulu vísa okkara styrki og okkara samanhald. Tað er jú lætt at stuðla, tá tað gongur við. Og lætt at vera ímóti, tá tað gongur verri.

Men eg havi góðar vónir um, at tað fer at eydnast okkum. Tað finst onki alternativ til ein sterkan Tjóðveldisflokk, um Føroyar skulu halda fram á sjálvbjargnisleiðini. Tað finst onki alternativ til Tjóðveldisflokkin, um vit skulu forða fyri, at menningin í føroyska samfelagnum støðgar upp og vit fara at detta aftur í fortíðina.

**Skulu ganga við røttum ryggi**
Vit eiga at ganga við røttum ryggi. Tjóðveldisflokkurin hevur tikið ábyrgd og avleiðingar av krøvunum til at skapa eitt betri og sjálvbjargið samfelag. Tað vil altíð kosta nakað. Vit eiga sjálvandi eisini erliga at taka ábyrgd av og læra av tí vit hava gjørt skeivt og at rætta uppá okkara mistøk frameftir.

Men vit eiga at vera errin av teimum ótrúligu framstigum, ið eru gjørd í føroyska samfelagnum, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur sitið við ábyrgd og vit hava hildið sjálvbjargniskósini. Allastaðni hevur samfelagið ment seg. Allar vælferðartænastur eru betraðar munandi. Gerandisdagurin hjá øllum føroyingum er vorðin munandi betri og tryggari. Samfelagið er útbygt og bundið saman við íløgum, ið eru goldnar kontant. Og vit hava sett okkum krøv, sum eru hildin og tikið avleiðingar og uppgerðir, sum eru neyðugar fyri at skapa eitt sjálvstøðugt samfelag, har vit kunnu hava álit hvør á øðrum.

Vit hava hildið neyvt skil á búskapinum og lagt upp fyri verri tíðum. Tí kunnu vit í dag klára at standa ímóti, sjálvt tá týdningarmiklar vinnur sum alivinnan og rækjuvinnan eru í stórum trupulleikum, og fiskaprísirnir eru falnir. Vit kunnu bert hugsa okkum til, hvat hevði hent, um allur blokkstuðulin hevði verið brúktur og landskassin hevði verið heftur í studningi, nú viðurskiftini úti í heimi leggja trýst á okkara búskap.

**Vit støðga ikki her**
Tjóðveldisflokkurin hevur greið boð uppá framtíðina:

- Vit hava boðini uppá, hvussu vit framhaldandi hava skil á búskapinum og skapa tryggleika.
- Vit hava boðini uppá, hvussu vit fáa eina uppgerð í vinnupolitikkinum, sum kann skapa nýggjan framburð í føroysku vinnuni og búskapinum.
- Vit hava boðini uppá, hvussu vit byggja tryggar og ábyrgdarfullar sosialar skipanir, sum ikki verða broyttar frá degi til dags. Eitt nú á pensiónsøkinum, við barsilsskipanini og á eldraøkinum.
- Og vit hava boðini uppá, hvussu Føroyar skulu menna seg sum eitt land í heiminum, har vit ikki fjara burtur sum ein útjaðari ella ein blindgøgn í Danmark og ES.